# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hví gera so nógv burtur úr mær? Hvat við tí, sum hevur størri týdning so sum støðan í Irak*

*(Paris Hilton)*

# Vatnflóð í Asia



*Gloprarregn hevur elvt til stóra vatnflóð í Guandong-landspartinum í Kina, haðani hendan myndin er. Sambært myndugleikunum eru minst 71 fólk druknað. Í Bangladesh er eisini vatnflóð, og har eru 87 fólk deyð*

# Hann fekk 10 mia. í mutri

**Saudiarabiski prinsurin Bandar fekk sambært BBC 10 mia. krónur frá bretskum vápnafyritøkum aftur fyri nakrar sáttmálar**

Tað avdúkaði sjónvarpið BBC í einari sending í gjárkvøldið, og sambært sendingini var bretska verjumálaráðið vitandi um tann ovurstóra muturin.

Í 1985 skrivaði Saudiarabia undir ein risastóran sáttmála um vápnakeyp úr Bretlandi. Sáttmálin umfataði millum annað 72 nútímans stríðsflogfør av slagnum Tornado og 30 flogfør av slagnum Hawk, og fyri vápnini skuldi Saudiarabia gjalda meiri enn 450 mia. krónur.

Bandar prinsur, sum er sonur saudiarabiska verjumálaráðharran, var saudiarabiskur sendiharri í USA, men gjørdi eftir øllum at døma sítt til, at Bretland fekk tann stóra sáttmálan. Í sendingini hjá BBC kom fram, at Bandar prinsur fekk nógvar pengar fluttar á sína bankakontu í USA, stutt eftir at vápnasáttmálin var undirskrivaður. Talan var um meiri enn eina mia. krónur um árið í fleiri ár.

Sambært BBC visti verjumálaráðið í London, at mutur var uppi í handlinum, og bretsku myndugleikarnir royndu eisini at fáa BBC at taka sendingina av skránni. Tony Blair, forsætisráðharri, skal hava mælt støðini frá at gera meiri burtur úr málinum, men til fánýtis.



*Bandar prinsur. Sambært BBC fekk hann meiri enn 10 mia. krónur í mutri frá bretskum vápnafyritøkum*

# Amerikanskir hermenn skutu afghanskar løgreglumenn

**Afghonsku myndugleikarnir siga, sjey løgreglumenn doyðu í skotbardaga við amerikanskar hermenn í nátt**

- Orsakað av einari misskiljing lupu teir amerikonsku hermenninir á eina løgreglustøð í Nangarbar við tý syrgiliga úrsliti, at sjey av okkara monnum doyðu, segði løgregluovastin, Zemarai Bashary, við fronsku tíðindastovuna AFP. Hann legði afturat, at fimm aðrir løgreglumenn vórðu særdir.

Ein talsmaður hjá afghanska herinum vildi vera við, at amerikanararnir høvdu søkt at løgreglustøðini í einum álopi, sum sá út til at vera væl fyriskipað, men ein amerikanskur yvirmaður vildi harafturímóti vera við, at teir amerikonsku hermenninir blivu álopnir.

- Okkara hermenn vóru á veg at gera eina húsarannsókn, tá teir vórðu álopnir, og teir høvdu ikki annað í at velja enn at skjóta afturímóti, segði amerikanski yvirmaðurin.

## STUTT SAGT

### Iran styðjar Taleban

Amerikanska herleiðslan vil vera við, at Iran styðjar uppreistrarrørsluna Taleban í Afghanistan, samstundis sum landið eisini styðjar afghonsku stjórnina hjá Hamid Karzai, forseta. Amerikanski generalurin Dan McNeill sigur við tíðindastovuna AP, at Taleban hevur framkomna útgerð, sum rørslan fær úr Iran, og at krígsmenn hjá Taleban fáa venjing frá iranum. Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, vil eisini vera við, at Iran hjálpir Taleban. Iranska stjórnin vísir skuldsetingini aftur og sigur, at Iran hevur ongan áhuga í at hjálpa einari sunnimuslimskari rørslu sum Taleban.

### Einkja smuglaði

Ákæruvaldið í Serbia hevur gjørt av at kanna, um einkjan eftir Slobodan Milosevic, Mira Markovic, og sonur teirra, Marko Milosevic, hava forvunnið fleiri milliónir krónur við at smugla sigarettir til Serbia. Ein ákæri, sum burturav fæst við fíggjarligt lógloysi, vil vera við, at tey bæði smuglaðu nógvar sigarettir til Serbia í árunum frá 1996 til 2001. Sambært ákæruvaldinum kann smuglingin hava givið meiri enn 100 mió. krónur í vinningi. Hildið verður, at Mira Markovic og sonurin búgva í Russlandi.

### Nýggj sjókort

Í Grønlandi er danska sjóverjan farin undir eina røð av kanningum og mátingum, sum skulu brúkast til at gera eitt nýtt og meiri álítandi sjókort enn tey, sum nú verða brúkt, sigur útvarpið í Nuuk. Tvey skip, sum eru vorðin umbygd til endamálið, gera mátingarnar, og tey skulu millum annað gera mátingar í Julianehåbsvíkini, við Fiskifjørðin, á leiðini millum Sydprøven og Uunartoq og innanskers við Paamiut.